reportasjurøð | Lívið á Landssjúkrahúsinum


Mynd: Jens Kristian Vang

# Náttin er tung

**B7. Tað er ikki nógv, ið er meira natúrligt enn at vitja eina seingjadeild um náttina. Og B7 er seingjadeild av sonnum. Flestu sjúklingarnir har liggja lágt. Eftirsum at tað er sunnunátt, hvat er so uppaftur meira sjálvsagt enn at byrja við átrúnaði ...**

## Reportasja


**Høgni Mohr**

Gud er deyður.

Niðurnívandi uppáhaldið hjá týska heimsspekinginum, Friedrich Nietzsche, er sum slíkt eirindaleyst og miskunnarleyst í sjálvum sær. Tað tekur øll á bóli men eingi atlit. Og tað leivir onga vón úr erva. Einans eitt døkt og djúpt hol av glóðheitari glating.

Hóast Nietzsche neyvan meinti við, at ein ítøkiligur gudur hevði givið upp anda, fert tú at hugsa um Nietzsche, tá ið tú ert á náttarvakt á B7 á Landssjúkrahúsinum; tí tað er har, sum fólk av sonnum liggja lágt. Tú verður við undirlutan og finnur ongan kendan knabba at heingja kenslurnar á. Men er eingin vón á reseptini, kann ein viðhvørt ordinera eina skeið av spei. Gud er kanska deyður. Jón á Steig er tíbetur bara sovnaður.

Millum teir trettan liggjandi sjúklingarnar stendur um lív hjá tveimum teirra. Teir eru pre-terminalir. Tað er, at teir fyri stuttum eru farnir fyrsta fetið inn í tilgongdina, haðan eingin okkara kemur aftur. Tíma vit ikki at trúgva Nietzsche beint nú, kunnu vit siga, at hjá teimum hevur leiðandi yvirlæknin bara bakvakt. Fremst á vaktarlistanum stendur gud.

Hesa tungu náttina, meðan Føroya kønasti klinikari liggur heima og svevur so søtan, vakja tvær árvaknar og ungar sjúkrasystrar yvir teimum doyggj-andi og teimum, sum enn hava veruliga vón um leking ella linna. Sjúkrasystrarnar eita Halla Seyer Hansen og Rúna Lamhauge.

Vit práta nógv á vaktini; um egin lív, um at ein sjúklingur doyði leygardagin, og at ein doyggjandi er farin til hús. Og so tað, ið var ræðuligast hjá Rúnu at uppliva. At tað einaferð doyðu seks sjúklingar dag um dag í seks dagar. Slíkt setur seg í sinnið. Tá rakti tað Rúnu, at hetta ikki bara er eitt arbeiði. At tú, hóast tú heldur teg hava neyðuga frástøðu, ert nóg nær at brenna teg illa kensluliga.

Rúna vendir eisini nýggju Dimmu, sum hevur havt nakrar atfinningarsamar greinir um Landssjúkrahúsið fyri at varpa ljós á henda partin av heilsuverkinum. Rúna er hugsanarsom. Tað kann oyðileggja nógv fyri okkum og onnur, um málini verða lýst ov einvíst. Tað kann hava við sær, at vit fara at uppliva nógv meiri av hugburðinum, at nú ræður bara um at hava sín rygg frían. At tað eyka avrikið ongantíð verður framt, heldur hon.

Áðrenn kvøldvaktirnar fara heim, tosa Halla og Rúna við tær. Ein teirra garvaðu sigur, sum er. At tær vita nógv meiri um málini, sum hava verið umrødd í Dimmalætting. Men tær kunnu einki siga. Tær hava lógarfesta skyldu at tiga. Vit mugu bara liva við at kenna okkum forkert, heldur hon fyri heldur turrisliga.

Roynda sjúkrasystirin, ið er á veg heim, heldur fram við meira almennum práti um deyðan. Hon hevur hildið í hondina á føroyingum í hundraðtali, sum eru farnir inn um deyðans gátt. Hesi menniskjuni sova oftast. Tú kennir tað á andadráttinum, at deyðin nærkast, veit hon. Men avnoktanin hvørvur ikki fyrr enn allar evstu kláru løturnar. Uppgávulyndi ræður einans í